# FYLL TANGAN - HUGSA POSITIVT !!!!

**Nú er hann aftur her, Carsten Sommerskov - maðurin sum hevur bergtikið hundratals føroyingar, og sum kann læra eitt og hvørt menniskja at verða meira positivt.**

Í hesum landi eru nokk av menniskjum, sum eru negativ - og er tað lætt at fella í hesa grøvina. Tí er tað umráðandi, at læra seg at brúka heilan rætt, so ikki tann negativi parturin av heilanum vinnur á tí positiva.

At hugsa positvit, skapar eitt betur arbeiðsumhvørvið og har við eitt betur arbeiðspláss. Eisini í tí privata lívinum gongur alt lættari og betur við at hugsa positivt.

Skeiðini eru til vaskikonuna, skrivstovumannin, flakavinnuna, stjóran - jú øll hava gott av at hugsa positivt.

**Skeiðini verða á:**

**Hotel Føroyum týsdagin 9. september - kl. 19.00 til 22.00.**

**Kappróðrarneystinum á Glyvrum mikudagin 10. september - kl. 19.00 til 22.00.**

**Og á Hotel Øravík hósdagin 11. september - kl. 19.00 til 22.00.**

**Skeiðini kosta Kr. 860,- + mvg fyri hvønn luttakarara. Við í prísinum er bókin "Surfing på toppen af livet" og ábit í steðginum.**

Um fyritøkur hava áhuga at fáa Carsten Sommerskov inn á teirra arbeiðspláss, so hann kann halda privat skeið fyri øllum arbeiðsfólkunum á sjálvari fyritøkuni.
Av tí at undirtøkan sær út til at blíva stór, er tað avmarkað, hvussu nógv kunnu koma á hvørt skeiðið.

Vilja tit hava meira at vita, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum, ella vitja heimasíðuna www.sommerskov.dk



**IRIS**
Garðsendi 2
FO-700 Klaksvík
Tlf 456390 Fax 456391

*e-mail: iris@iris.fo*

# Massaga!

## Massagumiðstøð í J.C. Svabosgøtu.

Í okkara nýggja "Relax Room" í J. C Svabosgøtu, bjóða vit nú tað nýggjasta nýggja innan massagustólar.

Velji sjálvi ímillum :
Aksla-, ryggja-, lenda- og leggjamassagu
Ella massagu til allan kroppin

**Kom og royn teir !**

Opið er hvønn gerandisdag kl. 12 - 17, og eftir nærri avtalu.

| | |
|---|---|
| Prísur 13 min. massagu 1 ferð | kr. 50,00 |
| 10 túrakort | kr. 390,00 |

Sosialurin 341800

*"Massagen giver indre ro og ydre velvære."*

*Stolen går virkelig i dybden, og giver rigtig massage. Den er god til af finde de ømme punkter, og løsne for spændte muskler. Behandlingen virker både terapeutisk og afstressende.*
*Efter en lang arbejdsdag som fyrioterapeut, med handicappede børn og unge bruger Eliza selv massagestolen til at forebygge rygproblemer og smerter.*
*Hun anbefaler at den bruges hveranden dag for at forebygge rygproblemer og smerter.*



*Eliza Jacobsen, Vittarp, Fysioterapeut*

**Ergo & Hjálpartól** - alt innan hjálpartól -
J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 •Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

www.torshavn.fo

## Dagrøktarar til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir dagrøktarum.

**Vit bjóða**
eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tú fært hollan stuðul frá kommunalu skipanini.

Fyri at kunna hava børn í dagrøkt er neyðugt, at hølini har børnini verða ansað eru egnaði. Møguleikar skulu vera til uttandura virksemi.

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, leiðara ella Hildigunn Tausen, varaleiðara tl. 315160.

**Umsókn**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:
Tórshavnar kommuna,
Dagrøktarskrivstovan,
Kirkjuvegur 1,
100 Tórshavn.

- VIT HAVA HØLINI
TÚ HEVUR MØGULEIKAN

hondbóltur
fótbóltur
flogbóltur
badminton
borðtennis
tennis



fimleikur
samkomur
køkur

ØLL sum eru áhugaði í at leiga høllina í vetur, kunnu venda sær til umsjónarmannin:
tlf: 213 799
423 799
fax: 423 307
e-post: eidishall@post.olivant.fo

EIÐIS SKÚLI, ÍTRÓTTAR- OG SAMKOMUHØLL

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2466,
P/F Klaksvíkar Sleipistøð,
700 Klaksvík

**Viðtøkur broyttar:**
30.12.2002.
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 516.000,00 til kr. 1.032.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 516.000,00 við grunshækking.

*Skráseting Føroya tann 3. september 2003*

*Kristin Balle*

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Sosialurin - 311820

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin -tað loysir seg



**Vegna Føroya Skiftirætt verða hesar ognir lýstar til sølu**



# Sethúsognin Álvastíggjur 11, Tórshavn

**Grundøki:** 517 $m^2$. Kjallari og miðhædd uml. 100 $m^2$ hvør og loftshæddin uml. 75 $m^2$.
**Kjallarahædd:** vindfang, gongd, fýrrúm, eitt stórt og eitt minni rúm, ið hava verið nýtt til skrivstovu, køkur.
**Miðhædd:** trappu-uppgongd úr kjallara uppá loft, gangur, køkur, spískamar, stova, toilett, kamar, lítil hjallur.
**Loft:** 2 sovikømur, stór loftsstova, baðiverilsi.
**Byggiár:** 1969.

Húsini standa í friðarligum umhvørvi.

Garður er gjørdur um stykkið.

# Hús og trøð í Nesvík

Ognin er matr. nr. 4, Streymnes.

Húsini eru 36 $m^2$ við kjallara-, stovu- og loftshædd við tilbygningni uml. 12 $m^2$.

Trøðin er uml. 5.000 $m^2$

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

# Trøð í Norðragøtu

Um hóskandi boð fæst, verður ein ódyrkað trøð í Norðagøtu seld. Trøðin er 11.800 $m^2$.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, frp@advlaw.fo

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen , adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45




# Stuðul frá FITUR

ÍSLAND • FØROYAR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarvi millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.
Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttafeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Mentunarfeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald



Umsóknir skulu stílast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

ella

**FITUR**
**c/o Ferðamálsráð Íslands**
**Lækjargata 3**
**IS-101 Reykjavík, Ísland**

*Seinasta freist at søkja er 10. september 2003.*

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# Arbeiðsmenn

Søkt verður eftir 2 røskum arbeiðsmonnum at leggja rør til kloakk v.m. Teir, ið settir verða koma at arbeiða í stóru útstykkingini Hoyvíkshagi Suður.

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

**Byggisamtakið Hoyvíkshagi Suður**
Við Løgmannabreyt
FO-100 Tórshavn
Tlf. 315060